# Tøvd jólavættur



## Tilfar

- Ull í hesum litum: Húðlita, reytt, svart, myrkagrønt
- Tøvinál
- Eitt stykki av skúmmadrassu (umleið 5 cm x 5 cm x 10 cm)
- Tøvupútu
- Gult tógv (her Navia Duo brúkt)
- Tógvrestir (at vinda til noða)

**Mannagongd:**



Vint eitt noða umleið 17 cm í ummáli og eitt noða afturat umleið 22 cm í ummáli.

Legg húðlitta ull stramt um tað minna noðað og prikka við tøvinál runt alt noðað (høvd).



Legg síðan myrkagrøna ull stramt um tað større noða og prikka við tøvinál runt alt noðað (kroppur).



Nú verður høvdið sett omaná kroppin og prikka við tøvinálini gjøgnum høvdið og niður í kroppin.

**Síðan verða føturnar gjørdar:** Tak umleið 2 g av ull og forma ein fót við at prikka hann á eina tøvipútu. Ger ein fót afturat.






Set síðan føturnar fastar á kroppin og prikka gjøgnum fótin og upp í kroppin, til føturnar sita fastar.

**Síðan gera vit hendurnar.** Tak umleið 2 g av ull og forma eina hond við at prikka hana á eina tøvipútu. Ger eina hond afturat.



**Flætturnar:** Klipp 30 træðrir av gulum tógvi á 17 cm og ger eina flættu, bint um endarnar. Ger eina flættu afturat.





Prikka síðan flætturnar fastar á høvdið.

**Nú verður húgvan gjørd:** Klipp eitt stykki 5 cm x 5 cm x 10 cm av eini skúmmadrassu. Klipp stykkið keyluformað, ummálið umleið støddina á høvdinum.





Legg síðan reyða ull stramt um skúmstykkið og lat umleið 1½ cm av ull koma niður um skúmstykkið.





Prikka ullina fasta í skúmstykkið. Set síðan húgvuna á høvdið og prikka runt um, men lat niðasta partin av húgvuni vera leyst.



**Set nú nøsina á:** Tak umleið 1 g av húðlittari ull og rulla og prikka hana til eina lítla kúlu. Prikka hana síðan á andlitið mitt á andlitið.



Ger síðan munnin undir nøsini. Prikka síðan eyguni, byrja við myrkum og prikka síðan hvítt omanyvir, sí mynd.



